# Víkarmaðurin er ein funnin frensur hjá AB

vodafone deildin

**Andrass Drangastein er við árunum blivin ein alsamt ídnari AB-ari. Gamli EB-spælarin og róðrarmaðurin úr Haldórsvík, er nú vorðin formaður í AB**



Tað eru longu fleiri ár síðani, at Andrass Drangastein gjørdi av, at nevndararbeiði ikki var nakað fyri seg. Støður eru tó til fyri at broyta, og nú er víkarmaðurin tann, sum stjórnar argjafrensunum í royndini at seta klørnar fastar í føroyska fótbóltsoddin
Mynd: Álvur Haraldsen

Formaðurin í Argja Bóltfelag, Andrass Drangastein er ættaður úr Haldórsvík, og konan, Mami er ættað av Nesi í Hvalba. Seinastu 20 árini hava tey búð í Reynstúni, tætt við fótbóltsvøllin á Argjum. Nú er sonurin, Jobin partur av 1. liðshópinum hjá AB, og eru tey sostatt enn eitt dømi um tilflytarar, sum við árunum eru blivnir sannir argjafrensar.

Andrass spældi sum ungur við EB, men á unglingaárum fór hann at rógva kapp, og valdi hann Haldórsvíkar Kappróðrarfelag framum fótbóltin. Bróðir Mami, Róðin Schrøter var ein av grundstuðlunum hjá Royn í sínari tíð, so formanshjúnini í Reynstúni 3 eru væl kend við ítrótt.

**Dóttirin vakti áhugan**

Ein av fyrstu dystunum Andrass sá besta liðið hjá AB spæla var júst ímóti Royn, har svágurin Róðin var á liðnum:

– Eg minnist talan var um ein dyst í steypakappingini. Dysturin var spældur har suðuri, og eg minnist AB tapti 9-0 ella 10-0. Og eg tonkti við mær sjálvum, hvat hetta var fyri eitt lið, sigur Andrass flennandi.

AB var seinasta fjórðingin av 20. øld í triðbestu deildini og gjørdi ikki tær stóru skreytirnar á tí føroyska fótbóltspallinum. Sanni áhugin fyri AB byrjaði ikki hjá Andrassi, fyrr enn dótturin, Jutta fór at spæla fótbólt.

– Eg ferðaðist runt landið við liðnum hjá henni, og eg bleiv bara meir og meir bitin av fótbóltinum og felagslívinum í AB.

Andrass hevur annars á sinni verið nevndarlimur í kappróðrarfelagnum í Haldórsvík, og eftir tað lovaði hann, at hann skuldi ongantíð í nevnd aftur. Men hann bleiv alsamt meiri góður við AB, og tað førdi til, at hann kom uppí stuðlafelagið hjá AB. Við tíðini fekk Andrass eitt gott samstarv við Tórálv Stenberg, sála, sum í mong ár var ímyndin av Argja Bóltfelag, og gjørdist teir góðir vinmenn og samstarvsfelagar innan AB.

– Tá Tórálvur fór í gongd, var AB í botninum, og hann fekk felagið upp á ovastu rók, sigur Andrass um gamla vinmann sín.

Stuðlafelagið bleiv stovnað í 2001, og tá satsaði nevndin veruliga at setta gongd á verkætlanina um at fáa AB fram í fremstu røð. Hetta skuldi gerast við at fáa fleiri spælarar og fleiri pengar til felagið.

Fyrsta stóra stigið var tikið, tá AB kom upp í næstbestu deildina í 2003, og á heysti í 2006 varð tann stóri málsetningurin rokkin, tá felagið kom upp í bestu fótbóltsdeildina.

**Dýrur læripeningur**

Andrass minnist tað tiltikna mikukvøldið á heysti í 2006, tá uppflytingin upp í bestu mansdeildina var vunnin. Talan var um ein heimadyst ímóti FS Vágum.

– Eg sigi sum er, at eg táraði av gleði hetta kvøldið, tað var ein ótrúlig rúgva av argjafólki, sum vóru møtt upp til hesa søguligu løtuna. Tá klemmaðu vit allir hvønn annan, vit sum høvdu stríðst fyri hesum, greiður Andrass kensluborin frá.

AB bleiv eina góða, men dýra roynd ríkari við at spæla í bestu mansdeildini kappingarárið í 2007. Felagið hevur lært at satsa meir upp á spælarar, sum eru aldir upp í felagnum.

Andrass vil ikki siga nakað ilt um liðið, sum royndi seg í 2007, men hann kennir á sær, at hópurin í 2009 hevur eitt størri hjartað fyri heimstaðnum, og at tað ger mun inni á vøllinum. Andrass er eisini fegin um, at teir hava skipað «FC Argir«, har ein nevnd er sett til, burturav at taka sær av vodafoneliðnum. Og við drúgvu royndunum, sum venjaraparið Allan Mørkøre og John Petersen hava, trýr Andrass uppá, at tað fer at bera til at røkka, ið hvussu er 8. plássinum, og AB fer tá fyri fyrstu ferð í søgu felagsins at spæla tvey kappingarár á rað í bestu mansdeildini. Og tá er søga aftur skrivað á Argjum.

**Heri Simonsen**
**heris@sosialurin.fo**

## Metingin

**Royndirnar eru ikki tær, sum viga mest á Argjum. Hvørki millum spælararnar ella venjararnar. Tí er væl hugsandi, at fyrstu umførini av landskappingini fáa ovurhonds stóran týdning fyri, hvussu samlaða avrikið vignast. Lítil ivi er tó um, at tað verður kring niðurflytingarstrikuna, at AB fer at stríðast**

